## Krevur lægri bankagjøld

Evropiskir bankakundar rinda alt ov nógv til peningastovnar sínar fyri lán og tryggingar. Tað er greiða niðurstøðan hjá ES-nevndini, sum nú mælir til, at felags reglur verða settar í gildi á økinum. – Brúkarin skal fáa fleiri produktir at velja ímillum, og hesi skulu verða lættari at skilja, skrivar ES-nevndin í einum bóklingi, har felags bankareglur verða lýstar sum minni kompleksar og sum betri vernd fyri brúkaran.

## Beinleiðis formansval

Í einari roynd at styrkja nærdemokratiið hava nakrir limir í grønlendska Siumut-flokkinum skotið upp, at floksformaðurin skal veljast við uratkvøðu ímillum allar limirnar. Eftir núverandi skipan eru tað lokalfeløgini, sum velja formannin á landsfundi, men summi halda, at tað hevði verið meiri demokratiskt, um allir limirnir fingu høvi at velja. Uppskotið skuldi viðgerast á eykalandsfundi í dag. Í ár eru annars 30 ár, síðani Siumut varð stovnaður.

*Bryggjaríið hevur hildið til á Landavegi 32 í Havn síðani einaferð í sekstiárunum, men nú eru ætlanirnar at ríva tað niður og gera íbúðir har í staðin*

*savnsmynd*




# Keypið blaðið um allan heim

**Sosialurin letur í dag upp nýggja tænastu. Eina kiosk á alnetinum, har til ber at keypa dagsins blað í heilum líki**




*Á telduskíggjanum ber nú til at lesa dagsins Sosial, so skjótt sum hesin er framleiddur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

BLAÐSØLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri føroyska blaðsølu er dagurin í dag ein nýggjur varði. Sum fyrsta føroyska blað letur Sosialurin nevnliga upp kiosk á alnetinum, har til ber at keypa dagsins feska Sosial í heilum líki.

Í samstarvi við danska Ekstra-Bladet hevur Sosialurin ment eina skipan, har blaðið kann takast niður í PDF-sniði, og har lesarin so fær lisið blaðið – alt sum tað er. Tó við tí muni, at blaðað verður á telduskíggjanum, heldur enn í sjálvari pappírsútgávuni.

Hetta er ein kollvelting í tí føroyska miðlaheiminum. Kanska ber ikki til at tosa um kollveltingar á marknaðinum longur, nú broytingarnar eru somikið títtar innan bransjuna. Men hetta er í hvussu er enn eitt stig á leiðini at bøta um tænastuna til okkara til verandi og komandi viðskiftafólk, sigur Jan Müller, stjóri og ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.

Ikki minst vónar hann, at talan er um eina tænastu, sum nógvu føroysku útisetarnir kunnu fáa gleði av. Hetta tí hesi nú kunnu keypa blaðið, mest sum í somu løtu, sum tað er framleitt í Vágsbotni.

Møguleikarnir at keypa í nýggju kioskini hjá Sosialinum eru trinnir. Til ber at keypa blaðið í ein dag, ein mánað ella í heilt ár. Prísurin fyri hesar tænastur er ávikavst 13, 150 og 1.000 kr. Við haldinum ber eisini til at leita fram tann partin av blaðsavninum, sum er tøkur í PDF-sniði.

# Posthúsið opið ólavsøkuaftan

**Aftur í ár kunnu føroyingar, sum bíða eftir at fáa svar upp á umsókn teirra til danskar lærustovnar, fara á posthúsið á Óðinshædd ólavsøkuaftan eftir brøvunum**

POSTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Á hvørjum ári um ólavsøkutíð vænta føroyskir studentar og onnur at fáa svar uppá umsókn sína til donsk fróðskaparsetur.

Postverkið roknar við, at svarbrøvini koma til Føroya við flogfarinum ólavsøkuaftan. Tað er stórur gravgangur eftir hesum brøvum, tí brøvini skulu svarast straks. Fróðskaparsetrini skulu hava svar frá umsøkjarunum seinast um morgunin 1. august, so her er lítil tíð at geva út. Tey lesandi eru tí í stórari tíðarneyð fyri at kunna svara.

So Postverkið hevur tí aftur í ár av sínum eintingum biðið nøkur starvsfólk til arbeiðis ólavsøkuaftan á posthúsinum á Óðinshædd 2 í Tórshavn, har tey fara at royna at útflýggja brøvini millum kl. 13.00 og 15.00.

Henda løtan, tá brøvini verða heintaði, eru ógvuliga spennandi og til tíðir kensluborin. Summi teirra fara grátandi avstað aftur, tí tey fingu noktandi svar, meðan onnur eru ovurfegin tí tey eru sloppin inn.

Postverkið heitir á fólk um at hava gott samleikaprógv og møguliga fúlltrú við sær.